## Nýggjar reglur fyri kópaveiði

Kanadiska stjórnin hevur broytt reglurnar fyri kópaveiði. CBS News sigur, at tær nýggju reglurnar áleggja veiðimonnunum at tryggja sær, at kópurin er deyður, áðrenn skinnið verður skrædlað av honum. Tíðindini um tær broyttu reglurnar koma rættiliga óvart á eygleiðarar, tí fyri bara einum mánað síðani segði Gail Shea, fiskimálaráðharri, at Kanada fór at lata sínar veiðimenn brúka somu mannagongd í 2009 sum higartil. Tá mótmæltu ES og fleiri djóraverndarfelagsskapir, og tað hevur eftir øllum at døma havt sína ávirkan, sigur CBS News.



## Økja toskaaling munandi

Í Trøndelag í Noregi hava tey so góðar royndir við at ala tosk, at ætlanin er at fimmfalda alingina í økinum tey bæði næstu árini ella so. Í løtuni hava myndugleikarnir seks umsóknir frá feløgum, sum vilja sleppa at ala tosk í Trøndelag, sigur kringvarpið NRK. Tvær av umsóknunum eru frá einum felagi, sum ætlar sær at útflyta 1.500 tons av aldum laksi um eini tvey-trý ár. Ein talsmaður fyri felagið sigur, at felagið fer at brúka sínar royndir frá laksa- ig sílaaling til toskaalingina.

# Tað kostar at krevja sín rætt

**- Vit mugu stríðast fyri okkara frælsi, og vit eiga ikki at gevast, fyrr enn vit hava vunnið sjófólki sømilig kor, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Luttøkan á landsfundi Føroya Fiskimannafelags í gjár var ikki so stór, sum hon onkuntíð hevur verið. Einir 60 mans vóru á fundi, men tá talið hevur verið størst, hava einir 150 mans verið á árliga fundinum.

Flestu ísfiskaskip hava ligið um jólahøgtíðina og liggja framvegis, men nøkur loystu triðja og fjórða dag og eru úti.

Tey skip, sum eru á fjarleiðum, koma vanliga ikki heim, fyrr enn túrur er lokin.

### Vantandi kunnleiki

Á landsfundinum vísti felagsformaðurin á, at tað er sera trupult at hava sítt starv á havinum, og fiskimenn kenna trýstið, sum gongur á teir úr øllum ættum.

- Úr øllum ættum verða førdar ein rúgva av ógrundaðum atsóknum móti okkum, men hesar byggja fyri tað mest á vantandi kunnleika og fordómar.

Jan Højgaard segði, at tað eisini eru tey, sum royna at gera sær dælt av at finnast at fiskimonnum.

- Tað eru virki, sum ikki eru kappingarfør, ið vilja hava fisk fyri lítið og lætt. Tey royna at vísa á etisk virðir, men vit eiga at krevja, at hesi eisini hava sín etik í ordan, sum felagsformaðurin tók til.

Hann helt tað vera átaluvert, at tey fólkavaldu kenna so lítið til okkara høvuðsvinnu.

- Vit vilja tí loyva okkum at koma við eini áheitan á okkara fólkavaldu um at kunna seg betri um viðurskiftini í okkara høvuðsvinnu, tí hetta er ein fyritreyt fyri at kunna stýra føroyska samfelagnum.

Felagsformaðurin helt, at tað hevði komið fiskimanninum til góðar, um fólk høvdu størri vitan um fiskivinnuna.

- Hetta hevði í sjálvum sær verið nóg mikið til, at vanligi borgarin ikki treytaleyst góðtók allar tær negativu myturnar, ið mangan verða slongdar út móti okkum, legði hann aftrat.

### Frælsi kostar

Jan Højgaard segði, at Fiskimannafelagið fer at berjast fyri, at limir felagsins kunnu fáa sama rætt sum aðrir borgarar í Føroyum.

- Tað sigur seg sjálvt, at eingin í einum framkomnum samfelag kann góðtaka, at ein partur av fólkinum ikki hevur sama rætt til almannaveitingar, sum aðrir hava.

Hann segði, at um eitt samfelag góðtekur slíkt, er hetta tað sama sum at góðtaka mismun, og tað kann einki samfelag hava sitandi á sær.

- Vit hava longu ásannað, at tað hevur kostað dýrt hjá fleiri, sum hava gjørt krav upp á síni rættindi. Vit hava áður nevnt Carlton, men eisini umborð á øðrum skipum hevur tað fingið avleiðingar, at menn hava kravt sín rætt.

Felagsformaðurin helt tó, at fiskimenn eiga at verða greiðir yvir, at frælsi er nakað, tú ert noyddur at berjast fyri.

- Tí eiga vit ikki at gevast, fyrr enn vit hava vunnið okkum sømilig kor, legði Jan Højgaard aftrat.



*Jan Højgaard, felagsformaður, helt á landsfundinum í gjár, at tað hevði komið fiskimanninum til góðar, um tey fólkavaldu høvdu størri vitan um fiskivinnuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Navigatørar stúrdu fyri endurgjaldi

**- Tvingsilssølur og útistandandi hýra hava givið okkum nógv eyka arbeiði hetta árið. Vit hava lagt hýru út fyri limir, og felagið hevur tryggjað sær peningin við sjópanti í skipum, segði Eyðstein Djurhuus, formaður í FSN á aðalfundi í morgun**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár hevði Føroya Fiskimannafelag landsfund, og í dag er tað Føroya Skipara- og Navigatørfelag (FSN), sum heldur sín aðalfund í Norðurlandahúsinum.

Formaður í FSN er Eyðstein Djurhuus, og áðrenn frágreiðingin frá virki felagsins verður løgd fram, hevur nevndin í felagnum viðgjørt frágreiðingina og stendur soleiðis aftanfyri tað, ið sagt verður.

- Vit nýta hetta høvi til at bera fram okkara hugsan um ymisk mál, sum hava ávirkan á viðurskifti hjá limum okkara. Limir og onnur venda sær regluliga til okkara við ymiskum málum og fyrispurningum, og felagið leggur stóran dent á at veita eina munadygga tænastu til limirnar, sigur formaðurin, sum dagliga starvast á skrivstovuni sama við skrivara felagsins, Áshild Joensen.

Eitt, sum FSN leggur stóra orku í, er at gera viðmerkingar til øll lógaruppskot og kunngerðir, sum viðvíkja áhugamálum hjá felagnum.

- Hetta er okkara demokratiski rættur til veruliga ávirkan í einum vælvirkandi samfelag. FSN hevur eisini umboðan í fleiri alment settum nevndum og ráðum. Nógv arbeiðsorka fer til slíkt, og nevnast skal, at ongin samsýning verður latin fyri hetta arbeiðið.

Eyðstein segði á fundinum, sum byrjaði klokkan 11 í morgun, at tvingsilssølur og útistandandi hýra, hava givið felagnum nógv eyka arbeiði hetta árið.

- Vit hava lagt hýru út fyri limir, og felagið hevur tryggjað sær peningin við sjópanti í skipunum, legði hann aftrat.

### Carlton-málið

Formaðurin vísti á, at tíðliga í ár tók ósemja seg upp millum Fiskimannafelagið og reiðaríið hjá ídnaðarskipinum Carlton.

- FSN og Maskinmeistarafelagið høvdu onga ósemju fyri sínar limir. Mynstringarbann varð lýst og eftir einar tvær vikur frætti felagið, at arbeitt varð við at fáa skipið aftur til fiskiskap, hóast lýsta mynstringarbannið hjá FF.

Eyðstein segði, at FSN beinanvegin setti seg í samband við ein royndan løgfrøðing um at fáa eina útgreining av, hvat galdandi er í einum føri sum hesum.

Hann segði, at møgulig samhugatiltøk vórðu um-

# Felag eftirlýsir skipaðan

**- Vit hava ongan áhuga í, at fiskidagatalið ella skipatalið er so høgt, at eingin fær lønandi rakstur, men vit sakna ein skipaðan politikk, sum hevur til endamáls at minka skipatalið samsvarandi fiskidagatalinum, sigur Føroya Skipara-og Navigatørfelag**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á ólavsøku legði landsstýrið uppskot fram um fiskidagar fyri komandi fiskiár. Hetta uppskotið var rættiliga víðgongt og var ein avskrift at tilmælinum hjá Fiskirannsóknarstovuni. Lagt varð upp til munandi niðurskuð í fiskidagtalinum og víðfevndar økisfriðingar.

Á aðalfundinum í morgun vísti formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag á, at øll vinnan varð skelkað